SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Hebron, Argir**
Leygardagin kl. 20: Bønarløta: Vit biðja fyri Grønlandi.
Sunnudagur 15. juni: kl. 10.30: Morgunmøti og samstundis barnaansing.
Kl. 11.30: Samvera við drekka
Kl. 12.00: Sunnudagsskúli
Kl. 12.15: Møti. John Rajani talar.
Hjartaliga vælkomin í Hebron.

**Tórshavnar hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 18 Evangeliskt møti. Onki morgunmøti í summar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Samkoman Nardus**
hevur evangeliskt møti í Vakhús í Sandavági leygarkvøldið tann 14. juni kl. 19. Talari: Torkild Terkelsen.

**Miðvágs missiónshús**
Leygardagin kl. 20.00 Ungdómsmøti Annika Nattestad talar.
Sunnudagim - sunnudagsskúlin fer útferð til Kollafjarðar, bussurin koyrir kl. 13.00.
Møti kl. 18.00 Richard Johansen hevur eitt upplegg um meinigheit.

**Aglow møti í Sørvági**
verður í Húsmøðrafelagshúsinum í Sørvági leygarkvøldið kl. 20. Vit fáa vitjan úr Havn. Allar kvinnur hjartaliga vælkomnar.

**Saron, Flatnavegur 7, Vestmanna**
Sunnudagin 15/6 morgunmøti við breyðbróting klokkan 11. Veri hjartaliga vælkomin.
sí www.saron.fo

**Kollafjarðar Missiónshús**
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14 og møti kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Hvalvíkar missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli og kl. 18 Møti við Hansa Monu Joensen. Øll eru vælkomin.

**Eiði**
Leygardagin 14. juni, uml. kl. 20.30, hevur kirkjuligi útimøtibólkurin útimøti á Kirkjuvegnum. Aftaná verður sangløta í missiónshúsinum Karmel.

**Tjørnuvík**
Møti verður í bygdarhúsinum leygarkvøldið kl. 20 við Niels Jacob Nielsen, trúboðara. Johanna, Hallgerð og Marita syngja. Øll eru hjartaliga vælkomina

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Hósdagur kl. 20 Bønarløta.
Fríggjadagur kl. 21 Ungdómsmøti. Útferð - um viðrar.
Sunnudagur kl. 11 Familjugudstænasta í Glyvrakirkju kl. 12:15 Útferð fyri øll - bæði sunnudagsskúlan og møti, bussur fer frá kirkjuni eftir familjugudstænastuna, havið matpakka við.
Mikudagur 18. juni kl. 6 Bøn, kl. 20 Bíbiltími - Trúarlæra, Bíbliunnar íblástur v/Jonhard Olsen.
Øll eru hjartaliga væl komin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl.10.30 Møti.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21, Awake við Rúna Rasmussen
Sunnudagin kl. 17, Møti við Hjørdis H. Petersen. Sangur við Kirstin Olsen.
Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna
www.keldan.fo

**Missiónshúsið í Rituvík**
Sunnukvøldið kl. 18.00 møti við Niels Jacob Nielsen, trúboðara. Undir møtinum verður barnaansing.

**Missiónshúsið Karmel, Eiði**
Møti sunnukvøldið kl. 19 v/ Atla Rasmussen.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 13.30 verður sunnudagsskúli,
kl. 18 verður møti við Jørgin Jacobsen og
kl. 21 verður ungdómsmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, Stangaskákið 1**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti v/ André Matras.
Sunnudagin kl. 11 møti v/ André Matras. Barnamøti er samstundis
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 morgunbøn.

**Betania, Skopun**
Leygardagin kl. 14 Barnamøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúla-útferð. Møtast stundisliga við kirkjuna.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 fer sunnudagsskúlin útferð. Koyrt verður frá kirkjuni kl. 14. Øll eru hjartaliga vælkomin við.
Einki møti um kvøldið.

**Aglow Sandoy**
Summarmøti verður leygardagin kl. 19.00 í Samljóð. Oydis og Martin tosa. Sangur við luttøku úr Betania.
Allar kvinnur og menn eru vælkomin.

**Sion, Vágur**
Sunnudag kl. 11.00 og kl. 18.00.
Bønarmøti mánakvøld kl. 20.00.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygardagin kl. 15.00 Aglow.
Sunnudagin kl. 18.00 møti v/ Eddi og fleiri.

**Hvalbiar missiónshús**
Á møtinum sunnudagin 15. juni kl.18 talar Torleif Johannesen, sjómanstrúboðari. Filmur frá sjólívinum verður vístur. Øll eru vælkomin.

**Hov**
Fríggjakvøldið - um viðrar verður útimøti kl. 19.30. Viðrar ikki verður møti í skúlanum. Talarar Osvald Kjærbo, Róald Norðberg Sangarar Svein Petersen, Terji Nilsen, Kaj Meyer.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sandvík**
Leygarkvøldið - um viðrar verður útimøti kl. 20. Um ikki viðrar verður møti í Ranhøll. Á møtinum tala Osvald Kjærbo, Svein Petersen. Sangkreftir úr Suðuroynni luttaka.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sumba/ Betania**
Á møtinum kl. 18 talar Osvald Kjærbo
Um viðrar verður útimøti við Salin kl 19
Terji, Svein o. fl syngjaØll eru hjartaliga vælkomin

**Aglow Suðuroy**
Møti fyri kvinnur og menn verður í Frelsunarherinum í Vági leygardagin 14/6 kl. 15.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Evangeliskir fundir í Danmark**
*Samkoman Malta, tlf. 98944370*
Fríggjakvøldið 13. juni kl. 19.30 verður evangel. fundur í Mølleparken, Spangberg møllevej 16, Esjerg.
Leygarkvøldið 14. juni kl. 19 verður evangel. fundur í Skolehjemmet, Sønderlandevej 28, Sønderborg.
Sunnumorgunin kl. 10 Breyðbróting á somu adr.
Sunnukvøldið kl. 17 verður evangel. fundur í Staldgårdsgade 4, Vejle. Talarar: Levi Joensen og aðrir. Sangkreftir: Hans Jakku á Lava o.a. luttaka við vitnisburði og sangi. Eftir fundirnar bjóða vit ein góðan kaffimunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Felagið Tórshavn, náttartúrur**
Leygardagin 14. juni verður farið til Suðuroyar at ganga. Vit fara niðan á Borgarknap og víðari til Famjins. Farið verður úr Havn kl. 20.30 við Smyrli og møtt verður á Farstøðini. Túrurin er eitt sindur tungur, og gingið verður alla náttina. Farið verður aftur til Havnar kl. 7. Minst til at hava góð og heit gonguklæði og matpakka

**80 ára føðingardagur**
Tann 18. juni fyllir Oluf Djurhuus, Innan Glyvur 80 ár. Dagurin verður hátíðarhildin í høllini á Skála tann 28. juni frá kl. 18, har øll eru hjartaliga vælkomin. Vegna fyrireikarnar biðast tit vinarliga boða frá á tlf. 447373 ella 217373, 219365, 226760, 227380, 448670 áðrenn 21. juni.

14. juni hava Birgit og Gunnar Nattestad í Miðvági silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í heiminum á Hornavegi 5, har øll eru hjartaliga vælkomin til morgunmat frá kl. 9 til 14.

Mikudagin 18. juni hava Ann og Sámal Christiansen í Hósvík silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygarkvøldið 21. juni kl. 19.30 í bygdarhúsinum í Hósvík. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 12. juni á tlf. 422368 heima, 214820 Ann, 215687 Sámal ella á meyli ann@sosialurin.fo ella samal@samteld.fo

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 20. juli hava Kathrina og Jacob Petur Jacobsen Fuglafjørður, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin á hotel Norð á Viðareiði sama dag kl. 18.00. Tey ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 10. juli á tlf. 444120.

**Brúdleyp**
Fríggjadagin tann 20. juni kl. 15.00 giftast í Kaldbaks kirkju Rannvá Samuelsen úr Søldafirði og Tage Sørensen úr Tórshavn. Brúdleypið verður hildið á Hotel Føroyum kl. 19.00, saman við familju og innbodnum.

Sunnudagin 22. juni giftast í Kelduni í Skálafirði Linda Joensen, Fuglafjørður og Fríðfinn Jacobsen, Skálafjørður. Vígslan verður kl. 14. Vælkomst verður í Kelduni eftir vígsluna til kl. 19. Síðani verður døgurði fyri innbodnum.

Leygardagin 5. juli giftast Petra Sjóstein og Jóannes Larsen Jacobsen í Christianskirkjuni. Vælkomst verður í sjómansskúlanum kl 14.00 - 19.00. Tey í vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 262396 ella 220220 innan 25. juni.

Leygardagin 12. juli kl. 16.00 giftast í Gomlu kirkju í Gøtu Lív Gregersen, Norðragøta og Aron Olsen, Toftir. Veitslan verður í B68 húsinum á Toftum kl. 19.00. Tey ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 25. juni á tlf. 441955 ella tlf. 448036.

***Vit skulu giftast***
12. juli 2008 skulu Jóannes Henriksen, Tórshavn, og Elisabeth Frederiksberg, Strendir. Vígslan verður í Kelduni í Skálafirði kl. 12.00 og døgurði verður fyri innbodnum kl 16. Vælkomstur verður í bygdarhúsinum á Strondum frá kl. 21.00 við køkuborði v.m.



Leygardagin 19. juli kl. 14.00 giftast í Elim í Søldarfirði Kathie Rasmussen, Søldarfjørður og Heri Jacobsen, Klaksvík. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.30. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 30. juni hjá Kathie tlf. 441122/229844 ella Hera tlf. 215649

Leygardagin tann 19. juli 2008 kl. 1400, giftast í Havnar kirkju, Ingibjørg Eysturoy og Johannes Olsen, bæði úr Tórshavn. Veitslan verður í róðrarneystinum á Argjum kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá innan mánadagin tann 30. juni á tlf. 317835 ella 317866 ella +45 77410918 ella teldupost til johannesolsen@msn.co



Leygardagin 26. juli kl 14, giftast í Hvalbiar kirkju Jenny Niclassen og Magnar Haldur Næs. Veistlan verður hildin í Roynhøllini kl 18, tey í vilja gleða okkum við at koma, eru hjartaliga vælkomin at tekna seg innan 26. juni á tfl 229652 ( Jenny ) 510048 ( Magnar ) ella niclassen57@hotmail.com

Leygardagin 2. august, kl. 15 giftast í Hvalvíkar Kirkju, Paula Poulsen Eiði og Gunleif Hansen Hvalvík. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Hósvík kl.19. Tey ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 30. juni á tlf 422694 – 282220 – 584440.





Leygardagin 2. august kl. 13.00 giftast í Býráðssalinum í Klaksvík Maria Thorgeirsson, Klaksvík og Hanus Lind Sørensen, Hvannasund. Vælkomst verður í róðrarneystinum í Árnafirði kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 257510 Maria ella 286407 Hanus, innan 12. juli.

Leygardagin 2. august kl. 15.00 giftast í Vágs Kirkju Rakul Borg og Arni Djurhuus Brattaberg úr Vági. Veitslan verður hildin í VB-húsinum kl. 19. Tey ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 210972 ella 374350 eftir kl. 20. Teldupost: rakulborg@hotmail.com innan 10. juli.

Leygardagin 9. aug. kl. 15.00 giftast í Vágs kirkju Rebekka Thorsteinsson og Finnbogi Magnussen úr Vági. Veitslan verður hildin í VB húsinum kl. 19.00. Tey ið vilja gleða okkum við at koma verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. +47 71523009, 373749 ella 373422. Teldupost: fimagn@online.no innan 5. juli.

**Vit skulu giftast :-)**
30. august giftast Ása Súnadóttir, Skála og Jóhan Eliasen, Fuglafjørður. Vígslan verður í Skála kirkju kl. 14 og veitslan verður í bygdahúsinum í Leirvík kl. 19. Tey ið vilja gleða okkum við at koma, kunnu ringja á tlf 509512 (Ása) ella 595583 (Jóhan) áðrenn 1. juli.

